# Umboðsmaður í Aberdeen í fimti ár



*Sofus Poulsen, føroyskur umboðsmaður í Aberdeen hevur verið í starvi á føroysku umboðsstovuni í 50 ár (savnsmynd)*

*Sunnudagin 28. juni hevur Sofus Poulsen 50 ára starvsdag. Í tí sambandinum skipar Menningarstovan fyri móttøku á Parnassinum á Hotel Hafnia*

SVEINUR TRÓNDARSON

Sunnudagin 28. juni eru liðin 50 ár síðan Sofus Poulsen fór í starv á føroysku umboðsstovuni í Aberdeen.

Tað fyrstu tíðina arbeiddi Sofus sum hjálparmaður á umboðsstovuni, men tann 1. apríl 1965 tók hann við sum sendifulltrúi.

9. juni 1976 tók Sofus Poulsen við sum sendifulltrúi. Síðan 1. februar 1980 hevur Sofus verið sendifulltrúi ella umboðsmaður á føroysku umboðsstovuni í Aberdeen.

**Væl kent andlit í Skotlandi**

Í hesum drúgva tíðarskeiðið hevur Sofus Poulsen verið við í óteljandi tiltøkum.

Hann hevur verið ótrúliga raskur at hjálpa fyritøkum, feløgum,skipum og myndugleikum tá teir hava havt tørv á eini hjálpandi hond, skrivar Menningarstovan í tíðindaskrivi.

Sofus Poulsen hevur opna dyr, sum annars høvdu verið afturlatnar og hann hevur duga væl at skapa sambond, tá tað hevur verið fyri neyðini.

Afturat tí hevur Sofus eisini verið tann føroyska røddin í Bretlandi. Hann hevur borið fram føroysk sjónarmið og hevur kunnað føroyskar myndugleikar um viðurskiftið í Bretlandi, sum hava týdning fyri okkum.

**Móttøka á Parnassinum**

Landsins myndugleikar halda at 50 ára starvsdagur ikki eigur at fara órørdur aftur við borðinum og í tí sambandinum skipar Menningarstovan, vegna Løgmansskrivstovuna, Vinnumálastýrið, Fiskimálastýrið og onnur fyri móttøku á Parnassinum á Hotel Hafnia sunnudagin 28. juni frá klokkan 15 til 18.

Har verður so høvi hjá øllum, sum hava huga til tað, at hitta og heilsa uppá Sofus á merkisdegi hansara, sigur Menningarstovan at enda í tíðindaskrivinum.

# Wilhelm stjóri í Atlants Kolvetni

*Føroyska oljufelagið Atlants Kolvetni hevur fingið nýggjan stjóra. Tað er tann 36 ára gamli Wilhelm Petersen úr Vestmanna*

SVEINUR TRÓNDARSON

Fyri ikki so langari tíð síðan tóku menn seg saman um at stovna eitt føroyskt oljufelag, sum á jøvnum føti við tey útlendsku ætlar sær upp í oljuvinnuna.

Stutt eftir stovnanina lýsti felagið eftir stjóra í bløðunum.

Umsóknarfreistin var úti 12. juni og tá vóru fýra umsóknir komnar nevndini í hendi.

Burturúr hesum fýra valdi nevndin at seta tann 36 ára gamla vestmenningin Wilhelm Petersen í starv.

Wilhelm er útbúgvin civilverkfrøðingur og hevur doktaraheitið (Ph.D.-heitið) í framleiðslutøkni. Harumframt hevur hann eisini lisið búskap.

Seinastu seks árini hevur Wilhem Petersen starvast sum kredittleiðari í Føroya Sparikassa.

Áðrenn tað starvaðist hann á Danmarks Tekniske Universtitet, DTU.

Fyrstu uppgávurnar hjá stjóranum verða at føra endaligu samráðingarnar við tey samtøk, ið hava víst áhuga at samstarva við føroyska oljufelagið, P/F Atlants Kolvetni.

Wilhelm Petersen byrjar í nýggja starvinum fyrsta august.

Kjartan Hoydal, nevndarformaður í Atlants Kolvetni er væl nøgdur við talið av umsøkjarum.

– Tað var sera torført at velja tí allir umsøkjararnir vóru ógvuliga væl kvalifiseraðir til starvið sigur hann.

Allir umsøkjararnir til starvið vóru føroyingar.

**Sosialurin**

***– fimm ferðir um vikuna –***

